Fra: Bjarni Johansen <bjarni@vagur.fo>
Sendt: fríggjadagur, 14. november 2025 21:10
Til: Journalin hjá LMS
Cc: Delmar Tausen (delmar@hov.fo); Ása Holm; Eyðbjørn Thomsen
Emne: Hoyringsskriv

Gott kvøld
Av missgávum, hava vit ikki ansa eftir hoyringsfreistin var úti í dag.

Hoyringsskriv vegna borgarstjórarnar í Hovs, Porkeris, Sumbiar og Vágs Kommunu

Viðvíkjandi: Suðuroyartunnlinum

Vit, borgarstjórarnir í Hovs, Porkeris, Sumbiar og Vágs Kommunu, vilja við hesum hoyringsskrivi staðiliga mæla til, at arbeiðið við Suðuroyartunnlinum verður framt og raðfest sum ein ítøkilig langtíðaríløga í føroyska samfelagið.

Ein lívlinja fyri framtíðina hjá Suðuroynni

Tað hevur av alstórum týdningi, at vit suðuroyingar fáa sama møguleika at vera ein natúrligur og virkin partur av restini av Føroyum. Í dag er hetta ikki veruleikin. Núverandi farleið er ikki ein menning fyri Suðuroy, og hon tryggjar ikki framtíðar møguleikarnar hjá okkara borgarum.

Tey yngru ættaliðini mugu kunna ferðast, tá tey hava hug og tørv, til útbúgving, arbeiði, ítrótt, mentan og familjulív. At vera so tengd at eini farleið sum forðar fyri bæði trivnaði og búseting.

Vit hava ikki ráð at bíða

Tað verður mangan sagt, at Føroyar ikki hava ráð at gera ein Suðuroyartunnil. Men hetta er ikki rætt. Veruleikin er hin, at Føroyar hava ikki ráð at bíða.
Um ongin verulig menning kemur í ferðasambandið, er veruligur vandi fyri, at Suðuroyggin støðugt tómist fyri ungum familjum og í framtíðini mest verður mannað av eldri fólki.

Hetta er hvørki ein burðardygg menning, ein javnvág millum oyggjarnar ella ein politisk ábyrgd hóskandi einum samtíðar samfelagi.

Kommunurnar stríðast – men uttan betri samband er tað ikki nóg mikið

Kommunurnar í Suðuroy gera sítt til at eggja fólki at flyta til Suðuroynna og byggja sítt lív her. Vit hava íløgur í trivnað, bústaðir, tænastur og menning.
Men við tí núverandi og ofta ótrygga ferðasambandi, og teimum avloysaraskipum, sum hava verið fingin til vega, kennist støðan meira sum ein niðurliging av Suðuroynni enn sum ein verulig raðfesting.

Ein oyggj kann ikki mennast á einum undirstøðukervi, sum ikki er álítandi.

Fígging má finnast – loysnir eru til

Ein tunnil er ein stór íløga, men hann er eisini ein langtíðarloysn, sum kemur øllum landinum til gagns.
Tað má kunna finnast loysnir upp á eina skilagóða fígging, og um tað krevur eitt statslán úr Danmark, so er tað tað, sum má gerast.
Stórar verkætlanir krevja dirvi, heildarhugsan og vilja. Tað eigur eisini at vera galdandi fyri Suðuroyartunnilin.

Vit leggja okkum ikki út í linjuføring

Vit vilja samstundis staðfesta, at kommunurnar ikki leggja seg út í linjuføringina av tunnlinum. Tað er uppgáva hjá serkønum og myndugleikum at meta um bestu loysnir.
Vár áheitan er hinvegin greið:
Tunnilin skal gerast. Og hann má gerast nú.

Niðurstøða

Suðuroyartunnilin er ikki bara ein samferðsluætlan, hann er ein lívlinja fyri framtíðina hjá eini heilari oyggj, og ein fortreyt fyri einum jøvnum og sambundnum landi.
Vit heita á landsmyndugleikarnar at raðfesta hesa verkætlan, so Suðuroyggin kann fáa sama støði, somu tryggleika og somu framtíðarvónir sum aðrar Føroyar.

Vegna borgarstjórarnar í
Hovs, Porkeris, Sumbiar og Vágs Kommunu

Delmar Tausen
Ása Holm
Eyðbjørn Thomsen
Bjarni Johansen

Vinarliga

Bjarni Johansen
Borgarstjóri
Tel: 239304
bjarni@vagur.fo

VÁGS KOMMUNA
Vágsvegur 57
FO-900 Vágur
Tel 66 30 00
www.vagur.fo

Fyrivarni
Hetta teldubræv, og viðfestu skjøl, er bert ætlað nevnda móttakara. Ert tú ikki rætti móttakari, er strangliga bannað at nýta innihaldið í teldubrævinum, og tú verður vinarliga biðin um at strika hetta teldubræv og siga Vágs Kommunu frá. Øll málsviðgerð hjá kommununi er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.